# Kjartan Dalbúð 80 ár



Í gjár, týsdagin 18. oktober, fylti Kjartan Dalbúð í Fuglafirði 80 ár. Føðingardagurin varð hildin á Vesturstovu, har Kjartan nú býr. Har var hann at hitta kl. 18-21.

Kjartan er fuglfirðingur. Foreldrini vóru Anna, sum var ættað frá Gøtugjógv, og Hans Dalbúð. Hann var føddur Eliasen, men keypti sær Dalbúð til eftirnavn. Børnini hjá Annu og Hans vóru tvíburðarnir Kjartan og Hjalmar, Adeleid Joensen, sum býr í Klaksvík, Piddi, sum búði í Vági og Jonleig Henriksen, sum búði í Havnini. Eftir á lívi eru Kjartan og Adeleid.

Kjartan hevur alla sína tíð búð í barnaheiminum á Dalbø í Fuglafirði. Hann lærdi at klippa hjá Eskild Norðbúð í Klaksvík, og hann hevði í mong ár klippistovu á Krossinum í Fuglafirði.

Kjartan hevur gott minni, og hann er áhugaður í og veit væl um familjuviðurskifti. Kjartan hevur altíð havt sera stóran áhuga fyri seyði og seyðahaldi, hoygging og øllum tí, sum hoyrir til í tí sambandinum. Hann var í mong ár røktingarmaður í Gjógvaráhaga, og ta uppgávuna gekk hann ógvuliga høgt uppí. Tað hevur verið ein av bygdarmyndunum í Fuglafirði at síggja Kjartan saman við hundinum, sum hann altíð hevði hjá sær, á veg til og frá røkting av seyði.

# Áku 60 ár

Sunnudagin 16. oktober fylti Dánial Jákup Petersen, vanliga nevndur Áku, í Fuglafirði 60 ár.

Áku vaks upp norðuri á Bakka, har umstøðurnar hjá børnum og serliga smádreingjum vóru stak góðar. Her var havnaøkið, har hópur av skipum legði at, og har var stórt virksemi.

Fótbóltsvøllurin, ið fuglfirðingar tá nýttu, var eisini á havnarøkinum. Ein av ídnastu fótbóltsspæl-ararnum millum smádreingirnar mundi vera Áku, og henda áhuga hevur hann havt síðani.

Tá ið fuglfirðingar í 1971 fluttu upp í bestu deildina at spæla fótbólt, var Áku sjálvandi við, og hann mundi vera millum bestu spælarnar, ið ÍF tá átti.

Í 1973 varð hann tikin út til fótbóltslandsliðið, og hetta summarið spældi hann á Seafield móti Hetlandi og í Bignold Park í Kirkwall móti Orknoyggjunum.

Krúnan á fótbóltslívinum hjá Áku mundi tað tó vera, tá ið hann í 1979 var við til at vinna fyrsta og higartil einasta FM heitið í 1. deild til ÍF. Saman við Sam Jacobsen var Áku veteranur



á annars ungum liði. Fuglfirðingar tóku eisini lut í hondbólti í sjeyti árunum, og eisini her var Áku millum teir fremstu, og í badmintonkappingum taldist hann millum teir frægu.

Tá ið Áku gavst at spæla, tók hann á seg venjarauppgávur millum teir yngru, og eisini hetta gekk hann upp í við lív og sál. Eisini var Áku nevndarlimur í ítróttarfelagnum ÍF í mong ár.

Mitt í sjeyti árunum høvdu fuglfirðingar tætt samstarv við ítróttarfelagið á Selfossi í Íslandi. Áku var við á øllum ferðunum til Íslands, og hann hevur framvegis tætt samstarv við íslendingarnar, sum spældu tá, og við teir, sum skipaðu fyri samstarvinum.

Áku er sonur Palmu og Einar Suðring í Fuglafirði. Sum heilt ungur fór hann til skips, og hann var nógvar túrar undir Íslandi við snøri. Seinni var hann við øðrum nýggjari førum, ið komu í flotan.

So segði hann sjólívinum farvæl, fekk sær útbúgving sum málari, og hann arbeiddi innan hetta økið í mong ár.

Seinni var Áku settur í starv hjá Fuglafjarðar kommunu sum húsavørður, og hetta starvið røkir hann framvegis.

Áku eru giftur við Pállfríðu, ið er ættað av Skála. Tey eiga trý børn: Súsanna, ið lesur niðri, Rúna, sum býr í Leirvík, og Áka, ið býr í Fuglafirði. Abbabørnini eru tvey í tali. Hjartaliga til lukku !

# Hákun givin á Tryggingini

Stjórin á Sjóvátryggingini seinastu fimm árini, Hákun Steingrímsson, er ikki longur í starvinum.

Hann hevur boðað frá, at hann nú gevst í starvinum, men tað er tó ikki stórvegis av viðmerkingum, sum hann vil geva hesum viðvíkjandi.

– Eg havi nú verið í starvinnum í fimm ár, og tí havi eg nú valt at leita mær aðrar vegir, sigur hann.

Hann sigur víðari, at uppsøgnin er latin í besta forstáilsi við leiðsluna í Tryggingarfelagnum, og at eingin av pørtunum hevur klamsað við hurðunum hesum viðvíkjandi.

Heldur ikki vil hann siga nakað um, hvørjar avbjóðingarnar eru, sum hann nú ætlar sær í holt við.

**- mørk**


MÓTTØKA

Í samband við at Hjørleif Christiansen, vegna aldur, fer úr starvi sum verkstaðleiðari, verður móttøka mikudagin 19. oktober kl. 14 - 17 í bilhúsinum/torn á flogvøllinum.

Øll eru hjartaliga vælkomin.

SLV Statens Luftfartsvæsen

um...
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
...er lisin
-so ert tú við!




**Fært tú ikki tikið teg saman?**

Hugsar tú um at seta eina heilsan í blaðið í sambandi við onkran merkisdag í familjuni ella hjá arbeiðsfeløgum. Her verður eitt nú hugsað um rundar dagar, føðingardagar, gullbrúdleyp, starvssetanir, jubileum á arbeiðsplássinum o.s.v.

Set teg í samband við okkum. Um vit fáa nøkur stikkorð, so kunna vit í felag skriva greinina, sum verður meira áhugaverd at lesa, tá ið tit senda okkum eina mynd við. Tað sama kann gerast í sambandi við minningarorð.

Sosialurin "Nøvn í vikuni" Tel.341800 / 216135 Teldupost: maggi@sosialurin.fo